## ST ávarar Karzai

Serligi ST-sendimaðurin í Afghanistan, norðmaðurin Kai Eide, ávarar nú Hamid Karzai, forseta ímóti at halda fram við somu embætisførslu sum hugartil. Í samrøðu við sjónvarpið PBS sigur Kai Eide, at Afghanistan er komið á eitt vegamót, og at tann nýggja stjórnin í Afghanistan má leggja á annan bógv enn tann núverandi. Ger hon ikki tað, kemur hon undir stórt trýst uttaneftir, sigur ST-sendimaðurin. Hann legði afturat, at altjóða samfelagið kann velja at arbeiða uttan um afghanska forsetan, um hann ikki fer undir at fremja neyðugar nýskipanir.



## Krossurin skal út

Ein úrskurður hjá Evropeiska Mannarættindadómstólinum í Strasbourg hevur fingið øði í nógvar italiemenn. Dómstólurin sigur, at kristnir krossar eiga ikki at hanga inni í italskum skúlastovum, tí teir kunnu órógva skúlagongdina hjá næmingum, sum hava annan átrúnað enn tann kristna. Fleiri italskir ráðharrar siga sambært Reuters, at úrskurðurin er skammiligur og niðrandi, og at stjórnin fer at kæra avgerðina. Í Italia verður tann kristni krossurin mettur sum ein partur av tí tjóðskaparliga arvinum og landsins mentan, og tí hevur málið elvt til øsing, skrivar Reuters.



*Okkara heimildir eru í lagi, sigur stjórin í Intrum Føroyar, Jákup Beck Jensen*

# Gott við greiðum reglum

**- Tá tað herfyri varð róð upp undir, at okkara heimildir ikki eru í lagi, so er hetta sjálvandi ikki so. Lógargreiningin á økinum burdi verið greiðari. Vit taka burtur av køkuni hjá advokatunum, og tað er helst tað, ið pínir, sigur Jákup Beck Jensen, stjóri í Intrum Føroyar**

INNHEINTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Føroyingar eru eins og onnur í Europa vorðnir verri gjaldarar. Tað staðfesta kanningar.

Ein orsøk til hetta er heimsfevnandi fíggjarkreppan, men innheintingarfyritøkan Intrum Føroyar hevur eisini annað boð uppá eina orsøk.

- Okkara ábending er, at ein stórur partur av teimum, sum ikki gjalda til tíðina, velja hetta tilvitað, sigur Jákup Beck Jensen, stjóri í Intrum Føroyum.

So hvørt sum gjaldsviljin sum heild versnar, økist tørvurin á skipaðari innheinting púra náttúrliga.

- Og tá er ein innheintingarfyritøka ein náturligur partur, sigur hann.

Innheintingarfyritøkur er nýtt fyribrigdi í Føroyum, og enn finst bert hin eina.

- Tað eru bert trý ár síðani at vit byrjaðu virksemið her í Føroyum. Framman undan høvdu kravánarar ongan annan møguleika enn at royna sum frægast at fáa peningin inn. Hetta er ofta ein long, tung og tíðarkrevjandi process, sum kann enda við, at fyritøkur og stovnar noyðast at fara til advokat eftir hjálp. Flestu fyritøkur velja at bíða í upp til seks mánaðir við at fara til advokat. Tí høvdu skuldarar frítt spæl í alt ov langa tíð, og ofta kom kravánarin í gjaldsføristrupullleikar, sigur Jákup Bech Jensen.

Ein innheintingarfyritøka styttir um innheintingartilgongdina og fer skjótari inn í málini.

- Meirvirðið, sum vit skapa kravánarum, er stytt bíðitíð og betri likviditet. Vit hjálpa eisini skuldarum burturúr mangan vónleysum støðum við at gera gjaldsavtalur, so peningurin verður afturgoldin yvir eitt tíðarskeið, sigur Jákup Beck Jensen.

### Kappast við advokatar

- Okkara arbeiði hevur sum so einki við virksemið hjá advokatum ella rættsliga innheintan at gerða. Vit eru ein "longdur armur" av bókhaldinum hjá kravánaranum, sigur Intrum-stjórin.

Hann upplýsir, at Intrum Føroyar hevur 400-500 fyritøkur og stovnar, smáar og stórar, sum kundar.

- Okkara virksemi er ein success, og tí eru tað nú prosentvís nógv fleiri fakturar, ið verða goldnir og tí ikki skulu víðari til advokat. Tí skilji eg væl, um onkur advokatur fatar okkum sum konkurrent og heldur, at vit taka breyðið úr munninum hjá sær, sigur Jákup Bech Jensen.

Hann leggur tó stóran dent á, at týðiligur munur er á at venda sær til Intrum og at venda sær til ein advokat við innheinting fyri eyga.

- Vit vilja bøta um pengastreymin hjá okkara kundum, uttan at skaða handilsliga sambandið millum seljara og keypara. Tað er neyvan úrslitið, um málið endar hjá advokati, sigur Intrum-stjórin, ið eisini peikar á prísmunin.

- Við okkara telduskipanum og føstu mannagongdum kunnu vit bjóða eina skjóta og smidliga tænastu til ein lágan kostnað, sigur hann.

### Heimildin í lagi

Í farnu viku varð ivi sáddur um heimildirnar hjá Intrum Føroyar at innheinta og taka kostnað frá skuldara, men hesum iva vísir stjórin aftur.

- Okkara ráðgevarar meta heilt greitt, at vit hava heimild til at innheinta og at áleggja skuldarum innheintingarkostnað. Um vit ikki høvdu verið vís í lógarheimildini, vóru vit sjálvandi ikki farin til verka í Føroyum, sigur Jákup Beck Jensen.

Hann vísir til tað faktuella grundarlagið.

Í Føroyum er galdandi lóg nr. 92 frá 23 februar 1988 "om ydelse af juridisk bistand samt om inkasso-og detektivvirksomhed m.v."

Eftir §1 stk. 1, nr. 2 fevnir lógin um ein og hvønn, hvørs vinnuliga virksemi er at heinta inn peningakrøv (inkassobureauer). Ikki ber til at fáa løggilding (autorisatión) til tað virksemi, sum lógin fevnir um, og tí er løggilding heldur ikki neyðug.

- Mær kunnugt er í Danmark galdandi lóg um inkassovieksemi, ið krevur, at onnur enn advokatar og peningastovnar skulu hava løggilding, fyri lógliga at kunna reka slíkt virksemi. Harvið er løggáva og rættarvenja ymisk í Føroyum og Danmark, sigur Jákup Bech Jensen.

Stjórin í Intrum Føroyum er sannførdur um, at tað hevði verði ein fyrimunur um reglurnar vórðu eitt sindur greiðari á innheintingarvirksemi.

- So høvdu vit sloppið undan at ivi verður sáddur um okkara virksemi og heimildirnar, vit arbeiða út frá, sigur Jákup Bech Jensen.

- Hetta var eisini orsøkin til, at eg kontaktaði brúkaraumboðsmannin, tá hann varð settur í starv. Vit høvdu fund í summar, har eg greiddi umboðsmanninum frá okkara virksemi og marknaðarføring. Vit samdust um at arbeiða víðari við hesum, sigur Intrum-stjórin.